# Mary í Afghanistan

Mary krúnprinsessa kom í morgun til Danmarkar eftir at hava verið í Afghanistan og vitjað teir donsku hermenninar har. Hetta er fyrstu ferð, at Mary hevur verið í Afghanistan, og myndugleikarnir hava hildið ferðina loyniliga. Søren Gade, verjumálaráðharri, og Thor Pedersen, fólkatingsformaður, vóru við krúnprinsessuni á ferðini, og tey vitjaðu hermannalegurnar Camp Bastion, Armadillo og Price. Fyri einum ári síðani var Fríðrikur krúnprinsur og virjaði teir donsku hermenninar í Afghanistan.



# Pengar renna úr A-kassunum

Pengarnir renna úr teimum donsku arbeiðsloysiskassunum, nú altsamt fleiri danir gerast arbeiðsleysir. JydskeVestkysten skrivar, at kreppan kostar teimum donsku arbeiðsloysiskassunum 43,5 milliardir krónur í ár, sum er næstan níggju milliardir meiri enn í fjør. Tað eru serliga A-kassarnir hjá handverkarafeløgunum, sum gjalda nógvar pengar í hesum døgum, tí á summum økjum er arbeiðsloysið millum handverkararnar vaksið úr tveimum prosentum í fjør í 12 prosent nú. Neyð lærir nakna kvinnu at spinna, so arbeiðsloysiskassarnior brúka munandi minni pengar til umsiting nú enn fyrr, skrivar blaðið.

# 150 tons seld á Fiskamarknaðinum



FISKASØLUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í gjár seldi Fiskamarknaður Føroya sløk 150 tons av fiski.

Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini var samanlagt 13,61 krónur fyri kilo. Hægsti kiloprísur var 60 krónur, sum varð latin fyri sløk 500 pund av kalva 3.

Størstu nøgdirnar vóru av toski 3 og 4. Talan var um tilsamans 57,7 tons, sum fóru fyri ávikavist 14,34 og 10,7 krónur fyri kilo.

Besti toskaprísurin á Fiskamarknaði Føroya í gjár var 23, 60 krónur fyri kilo, og hetta var fyri eina lítla nøgd av toski 1.

3,5 tons vóru av toski 2, sum fóru fyri miðalprísin 19,21 krónur fyri kilo.

Nakað av hýsu var eisini í útboði á Fiskamarknaði Føroya í gjár.

26,8 tons av hýsu 2 fóru fyri miðalprísin 11,42, og 10,7 tons av hýsu 3 fóru fyri 9, 67 krónur fyri kilo.




*Fuglafjarðar býráð hevur samtykt fíggjarætlan fyri 2010*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Neyðugt við varsemi tá myrk skýggj hómast

**– Býráðið er samt um at vísa størsta varsemi, nú myrk skýggj hómast í havsbrúnni, siga borgarstjóri og varaborgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu, Sigurd Simonsen og Dánjal Vang**

FUGLAFJØRÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fuglafjarðar býráð hevur nú samtykt fíggjarlógina fyri 2010. Skattaprosentið, sum er 21,5, verður óbroytt, og roknskapurin javnvigar við stívliga 58,7 miljónum krónum.

Skuldin hjá kommununi er minni enn ein álíkning og ætlanin er ikki at fara upp um eina álíkning.

Í komandi fíggjarári verður talan um fáar íløgur.

Fuglafjarðar kommuna leggur dent á at gjalda niður av skuld og soleiðis fáa størri rásarúm, sum tíðin gongur.

Borgarstjóri er Sigurd Simonsen, og varaborgarstjóri er Dánjal Vang.

### Vísa varsemi

Teir siga, at málið hjá kommununi er at styrkja um likviditetin við at fremja eina neyva fíggjarstýring, sum teir halda vera alfa og omega í einum góðum kommunubúskapi.

– Býráðið er samt um at vísa størsta varsemi, nú myrk skýggj hómast í havsbrúnni, siga borgarstjóri og varaborgarstjóri í Fuglafjarðar kommunu.

# Heykur og Falkur við stórari upsalast

**Síðan leygardagin hava fáar, men stórar landingar verið í Saltangará. Skipini eru úti, so okkurt er í væntu, sum dagarnir ganga**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag landa leirvíkstrolararnir Polarhav og Stjørnan 380.000 pund av upsa í Saltangará.

Seinasta leygardag landaðu Heykur og Falkur eisini í Saltangará. Teir høvdu umleið 485.000 pund tilsamans.

Á landingarmiðstøðini Kongshavn vita tey ikki við vissu, hvussu teir næstu dagarnir í hesi vikuni verða, men møguliga verður onkur landing aftrat, sum dagarnir ganga.

– Skipini eru úti, og í næstu viku verður so í øllum førum boð eftir landarunum aftur, siga tey á landingarmiðstøðini Kongshavn í Saltangará.



*Í morgun hava Polarhav og Stjørnan landað í Saltangará*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*